## Skal finna 24 milliardir



Danmark kann ikki halda fram við at hava einar 90 milliardir krónur í halli sum í ár, tí tað er meiri, enn reglurnar hjá ES loyva limalondunum. Tí skal Claus Hjort Frederiksen, fíggjarmálaráðharri, fram við tættkambinum, og ikki ein einasta ráðstova sleppur undan sparingum. Ráðharrin sigur, at tað almenna hallið skal skerjast 24 milliardir krónur tey næstu trý árini frá 2011 til 2013, og at tað skal gerast við størri inntøkum ella minni útreiðslum. Tað fjórða árið skal tað almenna spara átta milliardir krónur eyka, sigur fíggjarmálaráðharrin.

## Dýr flogferð

Rutuflogfarið hjá Air Greenland, sum var á veg úr Grønlandi til Danmarkar fyrradagin, noyddist at broyta kós og at millumlenda í Keflavík í Íslandi. Orsøkin var, at ein ferðamaður bleiv so illur í sær, at manningin helt tað ikki vera ráðiligt at halda fram til Keypmannahavnar við honum. Flogskiparin valdi tí at millumlenda í Íslandi, har løgreglan kom umborð eftir manninum. Hann sleppur tó ikki so, tí sambært Air Greenland fær maðurin eina rokning upp á í minsta lagi 100.000 krónur.



*Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, er sera misnøgd við, at Sands Kommuna ikki hevur røkt sína skyldu og hevur gjørt meiri fyri at bjarga lívinum í Sandsvatni*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Annika Olsen leggur trýst á sandoyingar

**Hon krevur nú, at kommunan á Sandi setir tiltøk í verk við brestin fyri at bjarga lívinum í Sandsvatni, áðrenn tað er ov seint**

DÁLKING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er kommunan sum hevur skyldu til at syrgja fyri, at alt lív í Sandsvatni ikki kódnar í dálking.

Tað staðfestir Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum.

Og hon harmast um, at Sands Kommuna í fleiri ár hevur misrøkt sína skyldu á umhvørvisøkinum, so at kloakkir og onnur mannaskapt dálking ikki endar í Sandsvatni.

Sandsvatn er nú so illa dálkað, at tað stendur um lív og metingarnar vísa, at tað ganga bara heilt fá ár, so at alt lív í vatninum týnt.

Hendir tað, er ov seint at seta tiltøk í verk tí tá er vatnið steindeytt.

Hetta hevur verið kunnugt í fleiri ár og á tingfundinum mikudagin vildi Bjørt Samuelsen, tingkvinna, hava at vita, hvat landsstýrið hevur gjørt fyri at syrgja fyri, at spillvatn og onnur dálking ikki rennur í Sandsvatn.

Hon veit av, at tað er ábyrgdin hjá kommununi at syrga fyri at umhvørvið ikki verður dálkað, men hon undraðist á, at landsstýrið ikki hevur lagt størri trýst á Sands Kommunu fyri at fáa hana at taka sína skyldu í álvara á hesum øki.

### Ikki nøktandi

Eisini Annika Olsen staðfestir, at tað er kommunan, sum hevur ábyrgdina á økinum og at Umhvørvisstovan skal hava eftirlitið, at kommunurnar halda sínar skyldu.

Hon sigur, at Umhvørvisstovan tekur málið í størsta álvara og í næstu viku fer Umhvørvsstovan til Sands at tosa við kommununa um málið og tað verður fylgt neyvt við gongdini og um kommunan fær viðurskiftini í rættlag.

– Tað er ikki nøktandi, at Sands Kommuna sum ábyrgdarhavari og umhvørvismyndugleiki á staðnum, ikki tekur trupulleikan um dálking á Sandsvatni í størri álvara, hartaði landsstýrið kommunustýrið á Sandi.

Og hon legði afturat:

– Tað er ikki nøktandi, at kommunan onki ger við ítøkiligu dálkingarkeldurnar við Sandsvatn, sum eru spillvatn frá meginskúlanum og tæðing hjá bøndrunum.

Og hon legði dent á, hvussu avgerðandi tað er at steðga hesum dálkingarkeldunum.

– Tá ið kommunan hevur fingið hesi viðurskifti í rættlag, verður mett um støðuna fyri at vita um tað er nøktandi.

– Ein oyðilagdur bygningur kann byggjast uppaftur. Men er eitt náttúruøki fyrst oyðilagt, bjargast tað ikki aftur.

Hon legði afturat, at tað er tann ósjónliga dálkingin, sum er tann hættisliga.

– Tí er tað avgerðandi at fáa viðurskiftini í sambandi við Sandsvatn í rættlag og tað við brestin og vit fara at fylgja málinum neyvt, segði landsstýriskvinnan.

### Gevur ikki atkvøður

Hon helt, at ein orsøk til at umhvørvið ikki hevur verið raðfest so frammaliga, er, at tað gevur fleiri atkvøður at byggja skúlar, barnagarðar og annað.

At fáa kloakkviðurskiftini í rættlag er kansa ikki tað besta valagnið.

– Men her má vend koma í og umhvørvið má fáa fremstu raðfesting, segði hon.

Hon vísti eisini á, at kloakkarbeiði er serstakliga arbeiðsskapandi og tí mátti tað verið eitt gylt høvi hjá kommunum runt um í hesum døgum at raðfest kloakkirnar, tí tað fær nógvar hendur í arbeiði.

### Bøndurnir dálka illa

Gerhard Lognberg vísti á, at sandoyingar eru komnir rættiliga væl áleiðis at binda kloakkirnar frá Meginskúlanum í rør, so at tað ikki longur verður veitt í vatnið og heilt skjótt er tann dálkingarkeldan sostatt burtur.

Men sambært Gerhard Olsen er tann stóri syndarin landbúnaðurin framvið vatninum. Serliga er tað tæðingin og tað, sum rennur úr køstunum, sum dálkar vatnið rættiliga illa, tí ein stórur partur av tøðunum renna lúkst í vatni, segði løgtingsmaðurin.

Onkur annar nevndi eisini, at tað, sum rennur frá handilstøðunum, dálkar eisini rættiliga illa.

Sum skilst eru tað eisini 17 húsarhald, sum hava sínar kloakkir rennandi í Sandsvatn.

# Vilja hava lív í 17 milllíónir

**Í ár verður munandi minni arbeiði hjá handverkarum av at umvæla almennar bygningar. Men peningurin, sum er tøkur, skal til arbeiðis sum skjótast**

ARBEIÐSSKAPANDI TILTØK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Pengingurin, sum er settur av á fíggjarlógini til at umvæla almennar bygningar fyri, røkkur ikki langt.

Sostatt skulu handverkarar ikki dúva upp á, at umvæling av almennum bygningum skal bjarga teimum árinum.

Tað kom fram í Løgtinginum mikudagin, tá ið Eyðgun Samuelsen, tingkvinna, vildi hava at vita, hvussu verður við játtanini til at umvæla almennar bygningar fyri.

Eitt, hon sipaði til, er, at í fjør gekk so seint at fáa sett skjøtil á, at í september var minni enn ein millión brúkt og hon vildi skumpa undir, at arbeitt verður skjótari í ár.

Annika Olsen, landsstýriskvinna vísti á, at at í ár eru 17 milliónir játtaðar til at umvæla almennar bygningar og tað røkkur ikki langt.

Í fjør vóru 12 milliónir settar á til at halda almennar bygningar, umframt 17 milliónir til bjálving. Men harafturat hevði hvør stovnur og hvørt ráð eisini eina serstaka játtan til umvæling.

Sostatt er talan er um eina munandi skerjing í ár.

Men hon legði dent á, at berast skuldi munandi skjótari at í ár enn tað var í fjør og arbeiðini skulu helst byrja longu tíðliga í vár.

Higartil eru fyribils raðfestingar gjørdar fyri 10 milliónir av teimum 17 milliónunum, sum eru til taks.

Og tær verða býttar soleiðis, at Búnaðardepilin, skal umvælast fyr 1,9 millión og Tilbúgvingarstovnurin, Mentamálaráðið, Prestagarðurin á Todnesi á Sandi og Heilsumálaráðið skulu umvælast fyri 1,5 millión hvør.

Harafturat skal sjóndepilin umvælast fyri 1,2 millión og Skúlin á Trøðni skal umvælast fyri 900.000 krónur.

Annika Olsen staðfestir, at virðið á almennum bygningum er fallandi, tí teir verða ikki hildnir.

Og játtanin, sum nú skal brúkast til umvælingar, skal raðfestast soleiðis, at peningurin fyrst og fremst skal brúkast so, at bygningarnir verða varðveittir og ikki farast. Men oftast eru orkusparandi tiltøk við í umvælingini.